

## Aftur í ár fara ítróttarfólk at ganga karnivalsgongu í Runavík

Heldur enn at hava vanligu skrúðgonguna leygardagin, hava fyriskipararnir avgjørt at eyndurtaka hittið frá í fjør við at skipa fyri einari karnevalsgongu áðrenn stevnan verður sett. Fríggjakvøldið 19. juni, á Eystanstevnu, verður nevniliga ein stór karnevalsgonga við hundratals fólkið. Í karnevalsgonguni verða ítróttarfólk og onnur, sum vanliga eru partur av skrúðgonguni. Ítróttarfólkini fara at hava hvørs sítt 'show', og eisini fara fleiri maskottar og annað spennandi at luttaka í gonguni sum fyriskiparnir ikki vilja avdúka enn.

# Felagshúsið hjá Dansifrøi verður eitt trivnaðarhús

**Í gjár bjóðaði húsanevndin hjá Dansifrøi til móttøku í sambandi við, at felagshúsið, sum bygt verður millum ítróttarhallirnar í Gundadali í Havn, nú stendur reist. - Byggingin hevur ikki verið nakar dansur á rósum, segði formaðurin í byggineyndini, Høgni B. Mikkelsen**

BYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Felagshúsið, sum Dansifrøi letur byggja í Gundadali, er nú komið so mikið áleiðis, at húsanevndin í gjár kundi bjóða til reisigildið á byggiøkinum.

Væl av fólki var samankomið, og millum hesi vóru arbeiðstakarar, arbeiðsfólk, fólk, sum standa fyri eftirliti, umboð fyri fíggingarstovn, umboð fyri Tórshavnar býráð og umboð fyri nevnd og limir í felagnum Dansifrøi.

Við móttøkuna hevði formaðurin í bygginevndini, Høgni B. Mikkelsen, eina frágreiðing um gongdina í arbeiðnum.

Síðan segði formaðurin í Dansifrøi, Petur Petersen, nøkur orð, og at enda bar formaðurin í mentanarnevndini hjá Tórshavnar kommunu, Jógvan Arge, eisini fram eina heilsan og ynskti felagnum eydnu við framhaldandi byggingini av felagshúsinum.

### Húsið innilokað

Formaðurin í bygginevndini, Høgni B. Mikkelsen, ynskti øllum vælkomnum – umboðunum fyri Tórshavnar kommunu, umboðunum fyri Eik Banka, ráðgevunum, Magnusi Hansen & Una Patursson, arbeiðstakarunum, Bjarna Poulsen, timburmeistara og Vest Trading við Magnusi Thomsen, sum hava gjørt stoypiarbeiði – og øllum arbeiðsfólkunum, sum hava verið við í byggingini.

- Eg vil eisini ynskja limunum í Dansifrøi vælkomunum – og ikki minst tykkum eldru, sum í sínari tíð vóru við til at stovna felagið.

Høgni segði, at nú felagið kann halda reisigildi, er hetta ein stór løta fyri limirnar í Dansifrøi, sum nú eftir 37 árum á baki kunnu síggja fram til at fáa egin felagshús til virksemið.

- Vit hava eisini eina samstarvsavtalu við Tórshavnar kommunu, sum við felagshúsinum tryggjar teimum ungu í býnum eitt gott dansistað, segði hann.

### Trupulleikar

Formaðurin í bygginevndini leit aftur á vakra mánadagin, 4. februar 2007, tá táverandi varaborgarstjórin, Jógvan Arge, setti spakan í til felagshúsið.

- Tá bleiv roknað við, at umleið eitt ár skuldi ganga, til felagshúsið stóð liðugt, men tíverri bleiv hetta ikki so.

Høgni vísti á, at bygginevndin rendi seg í ymiskar trupulleikar.

- Eftir at grundin partvís stóð liðug, og smærri broytingar skuldi gerast, kravdust nýggj loyvir. Vit høvdu fleiri samráðingar við Tórshavnar býráð, og endin var, at byggingin kundi takast uppaftur 28. november í 2008.

Hann segði, at byggiarbeiði síðan hevur verið darvað av, at byggingin rendi seg inn í hægstu vetrartíð, at bygginevndin varð umskipað eftir seinasta aðalfund hjá felagnum – og at fyritreytirnar fyri byggingini broyttust nógv í vetur.

Høgni segði, at bygginevndin eisini noyddist at gjøgnumganga alla bygginginga av nýggjum við ymisku arbeiðstakararnar fyri at finna út av, um hesir høvdu hug at halda fram og vildu vera við til at finna loysnir og sparingar, soleiðis at verkætlanin kundi fullførast.

- Vit noyddust eisini út at finna loysnir og tilboð upp á tey arbeiði, sum ikki vóru við. Hetta var neyðugt fyri at kunna fáa eitt fullfíggjað yvirlit yvir kostnaðin av felagshúsinum.

Formaðurin í bygginevndini segði, at eingin stuðul fekst frá landinum.

- Men tíbetur er okkara býráð altíð við til at stuðla og hjálpa, eins og Eik Banki hevur víst sín stóra vilja at vera við fyri á tann hátt at menna felagslívið í Tórshavn fyri teimum yngru og eldru í býnum.

Høgni segði, at tað hevur verið alt annað enn ein dansur á rósum at fáa øll hesi viðurskifti upp á plásss, og fundarvirksemið við øllum hesum hevur verið ómetaliga stórt.

- Enn er ikki komið heilt á mál, legði hann aftrat.

### Stórur vilji

Formaðurin í bygginevndini legði stóran dent á, at allir arbeiðstakarar og veitarar hava víst ein ógvuliga góðan vilja, soleiðis at hetta byggimál kann loysast.

- Eingin arbeiðstakari hevur enn tikið seg burtur úr, tó at fyritreytirnar fyri



*Í gjár stóð felagshúsið hjá Dansifrøi, sum verður bygt millum ítróttarhallirnar í Gundadali, reist*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Fitt av fólki vóru komin saman seinnapartin í gjár, tá Dansifrøi bjóðaði til reisigildi*